## Boyd skorar uttan íhald

Skotski álopsspælarin Kris Boyd skoraði tvær ferðir, tá ið Føroyar taptu 6-0 fyri Skotlandi á Celtic Park seinasta vikuskiftið, og Boyd hevur rættiliga skorað mál seinastu dystirnar. Hann hevur spælt sjey dystir í hesum kappingarárinum, og hann hevur skorað sjey mál. Í gjár skoraði hann eitt av málunum hjá Rangers í 4-0 sigrinum á Falkirk, og samanlagt hevur hann gjørt 25 mál í 26 dystum fyri Rangers. Á landsliðnum hevur hann skotið fýra mál í fýra dystum.

## Todi spruttaði í fimm minuttir



Í gjárkvøldið vann Start aftur í norsku Tippuliguni. Start spældi á heimavølli ímóti Lillestrøm og vann 2-0. Fyrra málið í dystinum gjørdi Kristoffer Hæsted, tá ið 35 minuttir vóru spældir. Todi Jónsson sat á beinkinum til heilt fram ímóti dystarenda, tá ið hann kom. Fimm minuttir vóru tá eftir at spæla, men Todi gjørdi beinanvegin um seg. Fyrst dró hann í vinstru, varð hildin av einum verjuspælari, fekk skot á, men bólturin streyk fram við málinum. Verjuspælarin fekk gula kortið fyri at halda. Í yvirtíðina serveraði Todi bóltin til Fredrik Strømstad, sum kundi senda í málið til 2-0.

*VB/Sumba*

*EB/Streymur*



*Lagið hevur verið gott í Sundalagnum seinastu vikurnar, og eftir sigurin móti VB/Sumba er lagið bara vorðið upp aftur betri, nú vegurin til fyrsta FM-heitið í søgu felagsins styttist fyri hvønn dyst*
*Mynd: Sofus Johannesen*

**Sigurin til oddaliðið á VB/Sumba í gjár var á ongan hátt ov lítil. Sorin Anghel fekk umsíðir aftur netið at flákra, meðan annars glóðheiti Arnbjørn Hansen misnýtti eina rúgvu av upplagdum møguleikum. Oddaliðið er vælkoyrandi og vegurin til fyrsta føroyameistaraheitið nakrantíð styttist fyri hvønn dyst**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

VB/Sumba – EB/Streymur 1-4 (0-2):

# Vegurin styttist

Lagið hevur verið gott í Sundalagnum seinastu vikurnar, og tað gerst bara betri fyri hvønn dyst felagsliðið spælir. Av tí sama høvdu minst 200 EB/Streymaviðhaldsfólk leitað sær suður til Vágs sunnudagin, har suðuroyingar vóru spældir bæði niður og norður, og kunnu vera glaðir um, at tapið ikki gjørdist meiri enn 4-1.

Undan dystinum høvdu suðuroyingar boðað frá, at teir helst sóu seg fáa stig burtur úr dystinum, meðan sundalagsmenn bara skuldu hava ein sigur. Men suðuroyingar vóru ongantíð nær einum stigi, og EB/Streymur var lat aldrin tann allarminsta ivan vera um, at teir vóru munandi sterkari enn felagsliðið í suðuroynni.

### Fyrsta málið í sjey dystir

EB/Streymur fekk fýra mál í dystinum, men møguleikar vóru til mangt slíkt.

Beinanvegin hótti Hans Pauli Samuelsen bæði verjuleikarar og málverja, tá hann driblaði seg í gjøgnum verjuna og royndi seg úti frá, men skotið fór dygst framvið.

Sorin Anghel vísti somuleiðis tíðliga í dystinum, at hann væl fyri og hevði stillað kanónina rætt. Tá eitt gott korter var farið, fekk hann bóltin í netið fyri fyrstu ferð síðani 3. juli. Eftir eitt frísparksinnlegg fekk hann bóltin í netið, men málið varð kolldømt orsaka av rangstøðu.

Fáar minuttir seinni var rumenin aftur upp á spæl og fekk bóltin í netið, og hesaferð stóð málið við. Gert Hansen tveitir eitt langt innkast, og tá verjan ikki gjørdi nakað sum helst við bóltin, so streyk Sorin avstað og einsamallur við málverjanum var hann tryggur og skoraði til 1-0, og var hetta fyrsta málið hjá Sorin í sjey dystir.

Løtu seinni økti EB/Streymur um leiðsluna. John Heri Dam legði hornaspark inn fyri, og við handaru stong steig Marni Djurhuus upp og stútaði bóltin í netið.

Tvey máls leiðslan helt sær til hálvleiks, hóast møguleiki var fyri fleiri málum aftrat. Bæði Arnbjørn Hansen og Sorin Anghel misnýttu stórar kjansir, meðan frægasta møguleikan hjá VB/Sumba hevði Birgir Jørgensen, tá hann royndi seg úti frá, men René Tórgarð tók skotið.

### 2 mál innanfyri 1 minutt

Í seinna hálvleiki vóru eisini fleiri kjansir, og tá umleið eitt korter var farið, fekk EB/Streymur aftur mál.

Fyrst skoraði Rafal Kwiecinski, tá Hans Pauli Samuelsen legði eitt innlegg inn í brotsteigin. Bólturin tók onkran á vegnum, sum so snýtti málverjan. Marcin Dawid var tó vakin og fekk vart fyri, men Rafal Kwiecinski var skjótur á returinum, og so var 3-0.

VB/Sumba hevði ikki meiri enn givið bóltin upp, so var aftur galið. Ronnie Samuelsen vann bóltin á miðvøllinum, og lítlibeiggin, Hans Pauli Samuelsen, spældi bóltin víðari til Sorin, sum aftur hesaferð var tryggur, tá hann var einsamallur við málverjanum.

### VB/Sumba vaknaði

Nú høvdu suðuroyingar fingið fýra mál í móti sær, men onkursvegna raknaðu teir eftir hetta. Teir fingu nú meiri spæl og komu nú eisini fram at EB/Streymabrotsteiginum, sum teir annars ikki høvdu sæð nógv til meginpartin av dystinum.

Birgir Jørgensen var millum frægastu suðuroyingarnar í dystinum, og var hann maðurin aftanfyri dupultkjansin, sum VB/Sumba fekk eftir at vera aftan fyri við fýra málum.

Úr spískum vinkli royndi Birgir Jørgensen seg við skotið, men bólturin brast á tvørtræið, og út til ein annan VB/Sumba-leikara, sum smekkaði til, men René Tórgarð vardi væl fyri, og so var tann vandin av.